EG MEINI TAÐ

200 og Hilmar Jan

Niels Uni Dam skrivar

Tað er løgið, sum summi fólk eru løgin. Her hugsi eg serliga um tær serligu verur, sum sita í blaðstjórnini á Dimmu.

Nú eru nógv fólk løgin á dámligar mátar, men tað er ikki hetta slagið av dámligum løginleika, sum merkir blaðstjórnina á Dimmu. Hetta er heldur okkurt sum líkist politiskum snævurskygni.

Hetta løgna politiska snævurskygni kemur ofta til sjóndar í teimum ofta stak áloypandi oddagreinunum.

Ein oddagrein er ikki undirskrivað, tí er ikki talan um persónlig sjónarmið hjá tí, ið skrivar, ein oddagrein umboðar sjónarmiðini hjá sjálvum blaðnum.

Summi hugsa kanska: "Dimma er eitt sambandsblað og tí verður oddagreinin hareftir." Men hetta er júst trupulleikin og tað løgna við blaðstjórnini; Dimma roynir á pappírinum ikki at vera eitt sambandsblað. Í undiryvirskriftini selur Dimma seg sum óheft og álítandi, blaðfólkið sigur at tað arbeiðir út frá onkrum luftigum ideali sum tað rópar "objektivitet".

Hví velur eitt óheft og álítandi objektivt blað at vera politiskt snævurskygt í sínum sjónarmiði? Hetta er í besta lagi eitt løgið val av blaðstjórnini.

Seinasta árið hevur Dimma í heilum lagt eftir bólkinum 200, tí teir arga sambandsmenn. Oddagrein eftir oddagrein hevur fordømt 200. Teir verða kallaðir bæði líkt og ólíkt. Dimma hevur staðið á einum hermóti og barst fyri neyðars happaða sambandsmanninum. Hvørja ferð 200 hava gjørt vart við seg, hevur Dimma skeldað.

Hetta er sjálvandi sera stórsinnað av Dimmu. Oddagreinirnar hava málað eina mynd av veika sambandsmanninum, sum blívur háðaður og spottaður av kynisku tjóðveldismonnunum í 200.

Eg skal ikki her siga um 200 veruliga forfylgja og happa ella um talan er um óskyldiga politiska satiru, sum kann samanlíknast við Ólavssøkukabarettina ella Óla P., tá hann plagdi at vera stuttligur.

Nei, mín trupulleiki er, at eg ikki skilji hvussu ein sokallað óheft blaðstjórn á einum álítandi blaði soleiðis finnist so nógv at júst 200, hvørja ferð bólkurin ger vart við seg.

Um hetta veruliga er almenn ónøgd við happing, so er ringt at skilja, hví Dimma ikki hevur lagt eftir Óla P., tá hesin seinnu árini hevur ført eina hets móti landstýrismanninum í fullveldismálum, ella eftir Jóannes í Innistovu, tá hann sendir muslimar, buddistar og onnur til helvitis, ella móti Hilmar Jan, tá hann leggur út við at spæla fúlheitirnar hjá Innistovumanninum frá morgunstundini, so at gud og hvør maður verður sendur til helvitis mitt í morgunmatinum. Her er ikki talan um skemt, men óndsinnaðan ágang.

Um tað veruliga eru tey veiku Dimma roynir at hjálpa, hví skriva teir so einki um hesi evni. Ella er tað kanska tað, at Dimma veit, at propaganda er lættast at selja ílatin objektivitet?

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

GAMLAR HAVNARMYNDIR

Lagt til rættis: Birgar Johannessen

Tónleikabólkurin Blue Star

Tað er synd at siga, at umstøðurnar hjá tónleikarunum í Havn í fimmtiárunum vóru av teim bestu. Men viljin at spæla tónleik og at fáa tað at ljóða, var harafturímóti framúrskarandi.

»Scenan« í Tórshøll var so lítil, at tá man sær hesa myndina, skilir man ikki, hvussu pláss hevur verið fyri hesum nígggju ungdómunum, einum stórum klaveri, einum trummusetti og so øllum hinum ljóðførunum pluss fýra nótastativum. Viðmerkjast skal, at tað bleiv ikki spælt meira enn í tveir og ein hálvan tíma til dans, frá kl níggju til hálvgum tólv á kvøldi.

Orkestrið vit síggja á myndini kallaðist Blue Star og er her avmyndað í 1955 í Tórshøll. Tey eru f. v.: Simme við klaverið, Linda Vilhelmsen, sangarinna, Petur Jacob Leitisstein á saxofon, millum Petur Jacob og Kjeld sæst høvdið á Halden Joensen, sum spældi trummur, síðani kemur Kjeld Thomsen á trompet, Jákup Thomsen saxofon, Magnus Dam Jacobsen, trompet, Ib Poulsen (hjá Barberinum) kontrabass, og síðst Napoleon (Pole) Djurhuus saxofon.

Myndaeigari: Kjeld Thomsen

Útsýni frá Debesartrøð

Á leið har sum Landsbókasavnið stendur í dag, sá tað soleiðis út fyri umleið 50 árum síðani. Myndin er tikin av Debesartrøð og eystureftir. Ein partur av tí smala Statsvegnum – sum í dag eitur J. C. Svabosgøta – hómast á myndini.

Myndaeigari: Kári Arge

Maðurin aftan fyri Emmu

Babu, babu, babu frá M´as Blues Band er kanska tagnað eitt sindur aftur, men maðurin aftan fyri tað heila, arbeiðir enn av fullum huga við bólkinum, og nýggir sangir eru eisini komnir undan kavi, síðani fløgan varð útgivin í fjør. Jóannes Jakobsen er maskinan aftan fyri Blues Bandið. Sosialurin var á gátt hjá Jóannesi í vikuni og fekk eitt prát við hann

Alt arbeiðið Jóannes gjørdi fyri at fáa fløguna hjá M´as Blues Band út varð gjørt ókeypis og í frítíðini

Mynd: Álvur Haraldsen

SAMRØÐA

Ingrid Bjarnastein

– Grundin til, at eg fór í holt við eina slíka verkætlan er, at hon hevur fyri tað fyrsta við menniskju at gera. Eg havi nú arbeitt eisini innan fyri ítrótt og har hevur tú við menniskju at gera. Og tað er tað sama við teimum menningartarnaðu, har hevur tú eisini við menniskju at gera. Tað er nógv meira krevjandi at arbeiða við fólki enn tað er við deyðum tingum. Krøvini til tín sum menniskja eru størri, tá tú arbeiðir við fólkum enn um tú til dømis skalt flyta ein ølkassa frá a til z, sigur Jóannes Jakobsen.

Jóannes sigur eisini, at í einum tílíkum arbeiði ert tú við til at menna onnur, og harvið eisini teg sjálvan. Eitt samanspæl millum tey, sum verða ment og teg.

Emma og hini hava verið at hoyrt nú líka síðani fløgan kom út, og tað man vera hvørt mansbarn her í Føroyum, sum kennir teir flestu sangirnar.

– Vit hava vant leingi og spælt til veitslur bara ímillum okkum sjálvi, greiðir fyrrverandi landsliðsleikarin frá.

– Upprunaliga var tað meiningin at gera eina mini-fløgu við nøkrum av sangunum bara til okkum. Eini 10 eintøk. Men tá vit so byrjaðu, so hugsaðu vit, hví ikki gera eina rættiliga fløgu, sum samstundis kundi vera ein hurðaopnari fyri fólk, so tey kundu fáa eitt nýtt andlit at seta á tey menningartarnaðu. Tey menningartarnaðu verða oftast sæð sum nakað negativt, og hetta er so ein møguleiki at seta tey menningartarnaðu í eitt annað ljós. Soleiðis kunnu tey eisini finna útav, at tey kunnu geva eitt positivt íkast til samfelagið og eisini vera ein partur av tí.

Gleði og hugur

Tað er ongin loyna, at arbeiðið við menningartarnaðum tekur longri tíð enn við øðrum. Men tó. Tann største munurin er, at undir øllum upptøkunum var gleðin tað berandi hjá teimum í M´as Blues Band.

– Um vit so noyddust at spæla lagið inn fleiri, fleiri ferðir, so var hugurin alla tíðina tann sami. Gleðin var tað, sum var tað berandi ígjøgnum allar upptøkutímarnar. Vit høvdu jú eitt minstamark, og tá vit nú skuldu geva eina fløgu út, so skuldi dygdin eisini verða góð. Fløgan skuldi ikki út fyri ein og hvønn prís, sigur Jóannes.

– Processin er tann sama, men tað tekur longri tíð at spæla tað inn enn hjá øðrum. At tey tíma ger so, at man tímur sjálvur uppaftur betur. Men tá eg fór undir verkætlanina visti eg, at hetta fór verða strævið, men tað er gleðin, sum er tað drívandi, og soleiðis gert tú eisini eina góða gerð fyri tey, sum eru minni ment í samfelagnum.

Eisini tungar løtur

At arbeiða við "vanligum" fólki er lætt, men at arbeiða við menningatarnaðum hevur soleiðis eisini eina avbjóðing við í sær. Fólk, sum duga at spæla, og duga at virka undir teimum vanligu fortreytunum eru lætt at arbeiða saman við, ístaðin fyri tá tú hevur við menningartarnaði at gera, tí tá eru umstøðurnar heilt øðrvísi.

– Tað vóru sjálvandi eisini tungar løtur inn í millum at fáa alt spælt inn, men fyri hvønn dag sum gongur, so veitst tú, at tú ert nærri málinum, og fyri hvønn positivan tanka tú hugsar, so kemur tú eisini tað nærri.

Reaktiónirnar Jóannes hevur fingið uppá fløguna hava allar verið góðar. At byrja við helt hann, at fólk keyptu fløguna fyri at stuðla, men hetta er nú einaferð tónleikur fólki dámar. Hann fellur lætt, og tá eitt "hitt" sum Babu er á, so er tað skjótt, at sølutølini verða hálað uppeftir.

M´as Blues Band hevur seinastu tíðina eisini verið úti og spælt fyri fólki, og sigur Jóannes, at hetta hevur verið heilt fantastiskt.

– Tey hava eisini ein tørv at verða góðtikin, og tey tíma væl at spæla. Tað eina vikuskiftið spældu vit heili fýra ferðir, og tað hevur eisini nógv at siga fyri tey, at fólk traðka fram, og vísa, at teimum dámar fløguna.

Eyðkennið fyri fløguna er spæligleðin. Tá tú fer undir eina slíka verkætlan, so veitst tú at hetta verður eitt langt stríð at koma á mál. Men bæði tey menningartarnaðu og tónleikararnir vístu ógvuliga positivan anda hesum viðvíkjandi.

Síggja møguleikarnar

Jóannes heldur, at tá fólk fara undir at gera nakað tílíkt, so síggja tey ofta bara forðingarnar, og ikki møguleikarnar.

– Tey velja heldur síggja tær 10 forðingarnar, ístaðin fyri ter 20 møguleikarnar, ið liggja í verkætlanini. Men sjálvandi, eins og hjá øllum øðrum, so hava vit rent á, og tá er ikki nógv annað at gera enn at bakka og so snara rundan um aftur næstu ferð. Hetta hevur eisini nógv við hugburð at gera, og einum nýtist at vera rímiliga jaligur um ein skal gera eitt tílíkt arbeiði.

Fløgan varð væl móttikin. Nógv betur enn Jóannes hevði væntað. Vónað varð at selja 500 – 1000 fløgur, men sjálvandi varð vónað eitt sindur meira í baktonkunum.

Og Emma og hennara fólk seldu eisini nógv meira. Hálvan desember varð annað upplagið av fløguni longu útselt, og tað vóru umleið 2500 fløgur.

Fyri peningin, ið er vunnin av fløguni er tónleikaútgerð keypt, soleiðis, at bólkurin eisini kann læra seg nýggjar sangir. Jóannes tekur fyrst sangirnar upp heima við hús, spælir teir inn og síðani læra tey í bólkinum seg sangirnar.

– Viðvíkjandi framtíðini er tað heila eitt sindur óvíst, sigur Jóannes Jakobsen, maðurin aftanfyri M´as Blues Band.

– Vit kundu gott givið eina fløgu út aftur í ár, men tað virkar kanska eitt sindur býtt, at tá vit nú hava givið eina fløgu út, sum varð væl móttikin, at leypa út í aftur beinanvegin. Men næstu ferð verður tað als ikki eins dýrt og fyrru ferð at geva eina fløgu út, tí nú hava vit útgerðina sjálvi.

Flennið

Skjótt fer M´as Blues Band á eina rundferð. Tað verður eitt rættiligt "show", sum er stuttligt og við nógvum sangi.

– Fólk halda seg ofta aftur við at flenna, tí tey vita ikki um tað hóskar seg at flenna eftir teimum, tá onkur løgin viðmerking verður send út í luftina, men tað skulu tey ikki halda seg aftur við, sigur Jóannes.

– Tað skal vera stuttligt, og um okkurt tílíkt kemur fram, so skulu tey sjálvandi eisini flenna.

Jóannes vil fegin takka Árna Andreassen og Finni Hansen, tí uttan teir hevði hann staðið rættiliga einsamallur við fløguni. Alt arbeiðið Jóannes hevur lagt í fløguna hevur verið ókeypis og gjørt í frítíðini. Tað er Sambýlið á Bóndaheygi 14, ið stendur aftanfyri útgávuna.